LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, við Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

PÍKADEKK Á FELGUM
4 píkadekk á felgum við org. skálum til Honda Civic. Passa eisini til aðrar jap. bilar.
Tlf. 505562

MAZDA 6 TIL SØLU
sær út sum nýggjur, frá august 2003, hevur koyrt 12.000 km, hevur cd-spælara og sportfelgur.
Tlf. 210207

MERCEDES VITO 110 CDI
vøruvognur, árg. 99 til sølu.
Tlf. 271777

TOYOTA CARINA E 1.6 SLI
Árg. 94, koyrt 198.000 km, reyður, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 224407

LÍTIL FLOTTUR
Toyota Yaris 15% Sport til sølu, árg. 02.
Tlf. 225785

TIL SØLU
Nýsýnaður Mitsubishi Lancer st.car 1,8 diesel frá 1990. Píkadekk á felgum fylgja við. Kr. 10.000,-
Tlf 270216

GER KVETTI
Ford Sierra 1,6 cl, árg. 88 við króki, sera biliga til sølu. Nógvir eykalutir fylgja við. Td. útstoyt, kølari, kobling, gearkassi. o.a. Eisini fylgja 4 píkadekk við í keypinum.
Tlf. 226883

JEEPUR TIL SØLU
Ein eldri Mercedes jeepur, árg. 80, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 252745 eftir kl 16.00

EIGUR NAKAR
skermbreiðkarar til Mitsubishi Pajero, árg. 89 av styttra modellinum at selja mær? Ringi
Tlf. 213701

TIL SØLU
4 píkadekk á felgum, Dunlop, til Toyota Avensis, stødd 185/65-15 til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 212092

TIL SØLU
4 píkadekk á felgum, stødd 195/70-15 til VW Transport til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 212092

OPEL ASTRA DIESEL
árg. 1999 við skaða til sølu. Bilurin hevur 2 hurðar.
Ring 316005/516005

TIL SØLU
Reyður Nissan Sunny, árg. 02/1989. Koyrt 155.000 km. Sýnaður í apr. 2004. Krevur smáar ábotur. Píkadekk fylgja við. Til sølu fyri 7000 kr.
Tlf. 220156/210000

TOYOTA COROLLA TIL SØLU
Árg. 1986, til sølu sum eykalutir fyri 3.000 kr. Hevur radio og nýggj píkadekk.
Tlf. 317414 ella 226315

TIL SØLU
Píkadekk á felgum til sølu, stødd 175/70 R13 fyri 1.500 kr.
Tlf. 255279

TIL SØLU
4 píkadekk á felgum til VW Passat 1.8 og 4 felgur 13" 4 hol til Charmant.
Tlf. 424605/227091

TOYOTA COROLLA 1.3i
árg. 91 til sølu. Koyrir væl, men krevur smáar ábotur. Sera góður arb. bilur.
Tlf. 449749/221349

PÍKADEKK TIL SØLU
4 píkadekk á felgum, sum nýggj, brúkt hálvan vetur. Passa til Peugeot 406. Prísur 3.000,-
Tlf. 585603

DEILIR
til Mazda 626 coupé, árg.89, lyktir, listar o.a. fæst sera biliga.
Tlf. 252506

PEUGEOT 406 2.0 ST BENSIN
Árg. 04/1999, gráur, koyrt 73.000 km, ABS bremsur, servostýring, centrallás, el-spegl, el-rútar framman, tokulyktir framman og aftan, hita í forsetrum, airconditión, CD-radio, alufelgur, er í sera góðum standi. Prísur: 110.000. Ring og fá meira at vita
Tlf. 580490

TOYOTA CAMRY
2.0 XLI aut. árg. 87. km. 242.000 til sølu.
Tlf. 581800

VETRARDEKK TIL SØLU
4 góð vetrardekk , Dunlop 175 x 65 x 14, biliga til sølu.
Tlf. 311791/511791

VETURGOMUL PÍKADEKK
á felgum til Kia Sepia til sølu.
Tlf. 448916 / 227260 eftir kl. 19.00

BILUR TIL SØLU
Hvítur Toyota Corolla árg. 94. Er í góðum standi. Áhugað kunnu ringja
tlf. 252040 eftir kl. 17

TIL SØLU
Ein Mitsubishi L300 bussur, árg. 1989, koyrir av tí besta, men illa rustaður. Hevur krossar frá sýn, orsaka av rusti. Selist fyri max 5.000 kr. Bilurin startar og koyrir sera væl.
Tlf. 572805 ella 372805

BÍLIGT!
Aluminiumsfelgur 16" við góðum dekkum 205/66-16. Passa til Pegeot, Citroen, Ford, Nissan o.a. bilar. Eru til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 583053

SUZUKI BALENO
Árg. 01, koyrt 65.000 km, til sølu fyri 90.000 kr.
Tlf. 421011 ella 229563

OPEL ASTRA 1.6
Árg. 98, koyrt 54500 km, sera væl hildin. Biliga til sølu.
Tlf. 220549

TIL SØLU
Óbrúkt vetrardekk av merkinum Bridgestone, stødd 185/65 R14. Dekkini eru á felgum, og passa til Toyota Carina E. Søluprísur 2.000 kr.
Tlf. +45 22808222

FELGUR TIL SØLU
17" AEZ, Icon5 felgur til sølu. Á felgunum eru Pirelli dekk, stødd 195/40 R17. Hava koyrt ca. 2000 km, og eru frá mai mánaði. Passa til Pegeot 306. Seljast fyri 7500 kr. Nýprísur 15.000 kr.
Tlf. +45 22808222

TOYOTA LANDCRUISER
3.0 TD, árg. 12/1997 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er nýsýnaður og er lakeraður í 2002. Hann hevur koyrt 140.000 km.
Tlf. 318460

4 PÍKADEKK
so gott sum nýggj, 175/70-14 á felgum, sum passa til VW, Passat, Polo, eru til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 741225

4 PÍKADEKK Á FELGUM
Passa til Nissan Cherry og aðrar bilar, til sølu fyri 1.600 kr.
Tlf. 741225

SUZUKI SVIFT
Árg. 90 til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 218778

PÍKADEKK
4 nýggj, 2 brúkt og 4 felgur til sølu. Stødd 175/70 R14.
TLF: 310757/269426

PRIMERA TIL SØLU
Nissan Primera 2,0 4 h, árgang 90, bíliga til sølu.
Tlf. 564040

YNSKIST
Toyota Camry árg. 88 til eykalutir.
Tlf. 270953

PÍKADEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk (175/65-14) tvey púra óslitin og tvey lítið slitin, á felgum til Opel Astra, til sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 443329

Amboð

VIÐFESTISVOGNAR
Tredal vognar, við spiral fjaðrum til sølu. Ein er á goymslu. Kunnu sígjjast á heimasíðu
www.tredal.no
Todal-Velbastað, tlf. 218101

Arbeiði

HEY HEY
Eg eri ein tilkomin álítandi kvinna, sum kundi hugsað mær at arbeitt uml. 2–3 tímar um dagin í einum handli, skóhandli ella okkurt við klæðum í Havn.
Tlf. 582990

27 ÁRA GAMAL MAÐUR
søkir arbeiði, havi vanligt koyrikort, alt hevur áhuga. Bert Norðoyggjar.
Tlf. 252506

ARBEIÐI YNSKIST
20 ára gamal drongur søkir arbeiði í Havn. Alt hevur áhuga.
Arbeiðsroyndir: Eg havi siglt, stoypt, smíða og arbeitt í handli og goymslu. Mær dámar væl at taka eina eyka hond í og hart arbeiði.
Tlf. 264534

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri 21 ára gamal og søki arbeiði í Havn. Alt hevur áhuga. Ring
Tlf. 227695

HJÁLP
Vit eru tvær gentur, 18 og 19 ára gamlar, sum søkja vaskiarbeiði skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 514451

ROYNDUR FISKARI
við línu, 20 árs erfaring søkir tjans.
Tlf. 584567/318401

FLISEARBEJDE
Pensionist søger mindre indendørs flisearbejde
tlf. 314434

ARBEIÐI YNSKIST
Alt hevur áhuga. Eg eri 24 ára gamal og búgvi í Tórshavn, havi royndir innan timburarbeiði o.s.fr. Havi koyrikort til vanligan bil og til trukk. Ring á
tlf. 509309/317109

EG ÀTAKI MÆR
at polera, bona og reinsa bil innan, sum uttan.Ring og frætt nærri
Tlf. 256495

Barnaútgerð

TIL SØLU
Fisher Price Baby Fitnesscenter (nýtt) við tónleiki til sølu fyri kr. 250.
Tlf. 522120

ODDER BARNAVOGNUR
v/ dýnu og kodda 3.000,- Bílstólur 0-13 kg. 450,- Ferðasong 300,- Babylift Brio 400,-
Tlf. 321647

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
riggar perfekt, bláur við termomadrassu, regnslagi, termoposa, fluguneti. Dýna fylgir eisini við. Alt til sølu fyri 1.100 kr.
Tlf. 215353

MYRKAGRÁUR ODDER
barnavognur v/ lyft, puslitasku, regnslagi og fluguneti til sølu + eitt systkinasetur. Ring
Tlf. 218071

TIL SØLU
Føroyskur skinnposi til sølu fyri 500 kr. Góðkendur bilstólur til sølu fyri 300 kr. Ring
Tlf. 505011

BILBARNASTÓLUR
9-18 kg. til sølu fyri 550 kr.
Tlf. 317564

Bátaútgerð

21' GLASTREVJABÁTUR
Við 20 HK Buck-motori og fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 221744 ella 217846

PLASTJOLLA YNSKIST
Til keyps. Best um hon er av merkinum Pioner Maxi.
Tlf. 217421

REFLEKS OLJUKABÚSS
við 2 kókiplátum. Alt fylgir við, tangi, rør o.a. Biliga til sølu.
Tlf. 226271/319871

EIN FLÓTIDRAKT
(yvirlivilsidrakt) FRC3, 275 N við sjálvuppblásiligum innbygdum bjargingarvestí. Nýprísur ca. 5.00 kr. aldrin brúkt, góð tá tú er á floti, til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 264955

20 STAMPAR LÍNA
4.5 mm til sølu.
Tlf. 226471 ella 282835

EIN FRAMBYGDUR 21' GLASTREVJABÁTUR
Við 20 HK Bukh-motori og fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 221744 ella 217846

38 FÓT v/ FISKILOYVI 5B
glastrevjabátur 10.7 x 3.95 m. árg. 93, moturur Cat. 670 HK. Niðursettur á 500 HK, árg. 2002, koyrt 2600 t. Vanlig nautisk útgerð. 4 nýggjar el-snellur. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220205

M/B NESTINDUR
Biliga til sølu, uttan fiskiloyvi.
Tlf. 221519

Bingo

NISSUBINGO
Stórt bingo verður í Pálsstovu sunnudagin 21. nov. kl. 16.00. Full pláta: Dagurðapakki til jóla, virði 700 kr. Tó 6. ong 12. spæl 1000 kr. Á lutaseðlunum: Heimagjørd nissupar, jólakalendari, tvær dukkur við klæðum, 2 jólakurvar, gás og gávubrævr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kyndil

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba leygarkvøldið 13. november kl. 19.30.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Bingo verður í Framtiðini mánadagin 22. nov. kl. 19.00
Høvuðsvinningur á lutaseðli: Apex ferðaseðil. Enskar karamellur burturlutaðar millum nøkur spøl. Eyka-eyka spæl verður.
Kirkjukórið Ljómur

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági týskvøldið 16. nov. kl. 19.00. Nógv gott at vinna, 1 rk. ísl.bógvur 2 rk. dunna og bingo verður gávukort á kr. 300,-, à lutaseðli m.a. dunna, før. gás og gávukort á kr. 500.00. Enskar karamellur burturlutaðar millum nøkur spøl og eyka-eyka spæl verður eisini.
Tvøroyrar Svimjifelag

JÓLASTOVAN
Verður 5. des. og jólabingo 12. des.
Samljóð

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði fríggjakvøldið 12. november kl. 19.30. Á lutaseðli 2 ísl. lambskrov.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum 11. november kl. 19. Eyka eyka spæl verður.
Tvroyrar Bóltfelag

GOTT BINGO
Verður í bygdasalinum á Skála leygardagin 13. nov. kl. 16.00.
Skála Ítróttafelag

BASARUR Í KFUK Í HAVN
Verður við eydnuhjóli, loppumarknaði, og konditarí hóskvøldið 18. nov. 2004 kl. 19.00. Á eydnuhjólinum er nógvur góður matur at vinna.
KFUM, Varðagøta 9

GOTT JÓLABINGO
verður í Róðraneystinum á Argjum hóskvøldið 11. november kl. 19. Nógvir góðir vinningar, millum annað karamellur, føroyskar gæs, føroyskt krov og nógv annað gott. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

Bøkur

ER TAÐ ONKUR
sum eigur »I form«-bløðini frá 2002, 2003 og 2004.
Vinarliga ring 522120

YNSKIST
Er nakar, ið hevur eina danskt/spanskt og eina spanskt/danskt orðabók at selja okkum.
Tlf. 361023 ella 228161

Burturm. /funnið

NIKE-HÚGVA
funnin í Sandágerði, myrkablá við gráum strípum. Hálvdan hevur mist hana.
Tlf. 314213

LAMB
hálvt frá horni og bragd aftan á høgra og aftan á stúgv á vinstra oyra, upptikið í Gjógvaráhaga. Eigarin verður biðin um at venda sær til
tlf. 281660

ERIKSON T65
Ljósagul Erikson T65 fartelefon funnin tætt við Tróndargøtu í Havn tann 31/10-04. Um nakar saknar hesa, vinarlig ring
tlf. 263991

SAMSUNG E700
Hevur nakar funnið eina Samsung E700 fartelefon? Hon er myrkablá og silvurgrá. Vinarliga ring
tlf. 312212/211255

FARTELEFON BURTURMIST
í vikuskiftinum miðskeiðis í oktober mánaða misti eg fartelefonina hjá mær burtur á Tvøroyri. Fartelefonin er ein grá Panasonic. Um nakar veit um hesa, vinarliga ring á
tlf. 455508 eftir kl. 18.00

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur handverkaralærlingur søkir eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 220202

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarigt par við einum barni, roykja ikki, ynskja íbúð í høvuðsstaðarøkinum skjótast gjørligt.
Tlf. 313120/224575

ÍBÚÐ Í MIÐBÝNUM
til ikki-roykjarar. Ljós og hugnalig íbúð við útsýni yvir býin, í friðarligum umhvørvi, er til leigu 1. jan. Gongd, nýtt bað, nýggjur køkur, 2 stovur, 3 kømur og hjallur. Ialt uml. 120 ferm. 5.500 kr um mánaðin + ljós og hita. 3 mán. depositum. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1957k

HJÁLP
Ungt par leitar eftir íbúð ella lítlum húsum í Runavíkar økinum. Bæði eru í læru og gjalda til tíðina. Kunnu tit hjálpa okkum, so ringið á
tlf. 218043 / 257707 eftir kl. 18

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
Besta útsýni um Vágsfjørð.
Tlf. 370060, 507902 ella 227318

TIL LEIGU
90 fermetra ljós og góð lofts-íbúð í Havn til leigu til friðarlig ikki-roykjandi persón(ar). Er ikki vælegnað til børn.
E-mail: ludde@tiscali.dk

KAMAR YNSKIST Í KLAKSVÍK
Helst við egnari inngongd! Fari væl um og royki ikki!
Tlf. 258664

VIKUSKIFTI Í KBH!
Góð 2-rúms íbúð (50 fermetrar) á Nørrebro til leigu í vikuskiftum fram til jóla fyri 600,- náttina. Ring og spyr um annað enn vikuskifti ynskist.
Tlf: 35841102/28461128

KVINNA
søkir verilsi skjótast gjørligt.
tlf. 273523

TILKOMIN MAMMA OG DÓTTUR
ynskja íbúð í Havn. Hvørki royki ella drekki. Max. 4.700 við øllum. Má hava 2 kømur. Vit eru friðarligar og fara væl um. Gjaldi rættstundis.
Tlf. 316219

ÍBÚÐ YNSKIST
23 ára gomul genta ynskir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Eri friðarlig og fari væl um.
Tlf. 222457

ÍBÚÐ ELLA HÚS
ynskist til leigu, helst á Streymoynni. Vit eru eitt par í 40-unum við góðum arbeiði. Vinarliga ring
tlf. 581036 eftir kl. 19

HÚS Í VESTMANNA
til solu um hóskandi boð fæst. Tey liggja væl fyri, mitt í bygdini við góðum útsýni.
Tlf. 0045 20942917 ella 0045 20942849

LÍTIL ÍBUÐ YNSKIST
Kvinna søkir lítla íbúð til leigu fyri sámuligan prís. Eri friðarlig, fari væl um og gjaldi til tíðina.
Vinarliga ring á 250955

HUS ØNSKES TIL LEJE
Jeg ønsker at leje et hus minimum 3 måneder, maks ca. 3 km fra Torshavn.
mailto: trine@hestekonsulent.dk

FYRIBILS LEIGUMÁL
Vit hava eina møbleraða íbúð til framleigu í Havn frá hálvan november til 1. juli 05. Íbúðin hevur køk við øllum hentleikum, spísistovu, stovu, gongd, hjúnarúmi, 2 kømurum og wc við vaskimaskinu. Leiga kr. 6.900 um mánan við ljósi og hita. Depositum kr. 5000.
Tlf. 507310 eftir kl. 17

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu á Streymoynni ella í Eysturoynni.
Ring 212995 ella 283322

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKJAST
Par fyrst í 40'unum við gentu upp á 16 ár søknast eftir húsi ella íbúð. Max 7.000 kr. við øllum.
Tlf. 215539

ÍBÚÐ TIL LEIGU!
Íbúð í Gøtu, til leigu frá fyrst í komandi ári, til friðarlig fólk, ið fara væl um.
Tlf. 741548

VIT ERU EITT PAR
ið søknast eftir einari íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Vit fara væl um, gjalda til tíðina og hava fast starv.
Tlf. 321721 eftir kl. 17.30

HÚS TIL SØLU
Hús undir Brúnni í Klaksvík til sølu.
Tlf. 224528

ÍBÚÐ
2 verilsi íbúð í Keypmannahavn til leigu í 1 1/2 ár, frá 5. des.
Tlf. +45 86950049

HÚS TIL LEIGU
Sethús nærhendis miðbýnum til leigu frá 1. januar, við ella uttan innbúgv.
Tlf. 217540 eftir kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par søkir íbúð. Eru friðarlig og fara væl um. Bæði hava fast starv.
Tlf. 228030/222066

ÍBÚÐ Á OYRASUNDSKOLLEGIINUM
í Keypmannahavn til framleigu frá 22. des. 04 til 01. feb. 05. Hevur allar hentleikar og liggur tætt við Metro, innkeypscentur og miðbýin.
Anna, tlf. (+45)32886912 ella (+45)61710670

ÍBÚÐ/KAMAR
ynskist til leigu í Tórshavn, Runavík ella nærhendis sum skjótast.
Tlf. 271376 helst eftir kl. 18

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum YNSKIR HÚS/ÍBÚÐ til leigu í høvuðsstaðarøkinum í seinasta lagi 1. jan. Teldupostur slp-bn@post.olivant.fo
Tlf. 322325 / 548020

VIT ERU EITT UNGT PAR
Sum ynskja at leiga eina góða íbúð í Havn. Vinarliga ring skjótast gjørligt.
Tlf. 573406 eftir kl. 16

VERILSIR Í KBH. TIL LEIGU
2 verilsir í eini 3 verilsis íbúð. Áhugað ringið
tlf. 212252/315885/+45 27244430

TRENINGSHØLI SØKIST
Vit fara væl um.
Tlf. 506407

TIL LEIGU
Núummvæld sethús í Hvalvík til leigu.
Tlf. 229349 ella 315921 eftir kl. 18

EITT NEYÐARRÓP
Ungt par barni væl á veg – í november – søkja desperat eftir einari góðari og bíligari íbúð. Helst undir 4.000 kr. við øllum frá 1. des. ella fyrr. Íbúðin má liggja í Havnar umráðnum, men gjarna uttanfyri centrum. Ringið sum skjótast á
tlf. 509991 ella 749991

ÍBÚÐ YNSKIST
Edrúiligur maður søkir íbúð í Tórshavn.
Tlf. 584567/318401

FRIÐARLIGUR
27 ára gamal maður søkir íbúð í Tórshavn. Havi fast arbeiði, fari væl um og gjaldi til tíðina. Send teldupost til torshavn@gmail.com ella
ring 273859

ÍBÚÐ TIL SØLU Í HVIDOVRE
42 fermetrar, 1 ver. íbúð til solu, liggur við síðuna av Rodovre station og kollegium, vælegnað til lesandi.
Tlf. 423149

Dansur

TIL LIMIRNAR Í DANSIFRØI
Kalda borðið verður í eygarkvøldið 13. november. Byrjað verður kl. 19.30. Seinasta freist at keypa atgongumerki er hósdagin 11. november.
Dansifrøi

Dýr

SEYÐAHUNDAHVØLPUR
tik, svartur/hvítur og brúnur og 1 1/2 mðr. gamal verður latin djóravini.
Tlf. 267410

DVØRGAHAMSTRARA-UNGAR
Vit eru tveir sera fittir ungar, sum kosta 10 kr. stk. Um tú hevur áhuga so ring
Tlf. 313966 ella 582703

KETTLINGAR
klárir at flyta heimanífrá, duga at leppa og eru reinligir.
Tlf. 361803

GÁSAPAR
Av góðum slag til sølu.
Tlf. 218086

RÍÐINGARSAÐIL
v/ øllum tilhoyri til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 265343

4 DVØRGAHAMSTRARA-UNGAR
til sølu fyri 50,- kr.
Tlf. 449804/264210

AKVARIUM 660 L
2,0 x 0,55 x 0,60 m. v/ fiskum og øllum tilhoyri. Til sølu fyri 4.000,- kr.
Tlf. 580262

MARSVÍN
Eitt hálvvaksið hann marsvín til sølu. Hann er svartur, gráur og hvítur, langhærður og sera vakur.
452081 ella 262329

MARSVÍNAUNGAR
Tríggir langhærðir marsvínaungar til sølu. Ein reyð og hvít hon, ein myrkabrúnur, reyður og hvítur hannur við krúnu og ein gráur/brúnur og hvítur hannur.
452081 ella 262329

TIL SØLU
Ein ektaður seyðahundur av tí góða føroyska slagnum til sølu. Átta vikur gamal. Foreldrini eru heilt góðir seyðahundar, sum fleiri mans á fjalli.
580472

EIN KANINUNGI
Fæst við at heinta hann. Ring
Tlf. 315942 ella 213736

PUDDILHVØLPUR YNSKIST
Hava tit ein tikarhvølp til okkum, so ring
tlf. 211632/317905

UNDULÁTUR
til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 271723

KETTLINGUR
Kettlingur (svartur/hvítur/ketta) fæst við at ringja
tlf. 421527/313260, Johnsson

Fundir

»GIMBRAGONGAN«
Sandavágur. Hagastevna í Gamla skúla leygardagin 20. nov. kl. 16.00.
Hagastýrið

FRÁ STØKK
Aðalfundurin hjá Støkk verður í Støkkhøllini 23. november kl. 20.00.
Nevndin

Húsarhaldstól

BRÚKT KØLI/SVALISKÁP
Tvær hurðar, hædd 180 cm. breidd 60 cm. Ovara er kølískáp, í neðra svalískáp. Kr. 1.800,-
Tlf. 257941

TIL SØLU
Bosch uppvaskimaskina til 12 persónar og eitt lítið køliskáp bíliga til sølu.
Tlf. 252383

Innbúgv

DUPULT VATNSONG
Fura dupult vatnsong til sølu. Kr. 2.000,-
Tlf. 257941

TIL SØLU
Veggreol 500 kr. Køksborð 200 kr. Song 100 kr.
Tlf. 229816

SOFABORÐ
træ v/ skuffu undir, mát l.h.b. 135, 52, 75, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315212

2 STANDILAMPUR
við lesilampu til sølu, kr 250 pr stk, kr 400 fyri báðar.
Tlf. 522120

2 TELDUBORÐ
til sølu, kr 200 pr. stk., kr 300 fyri bæði.
Tlf. 522120

CAFÉ-BORÐ TIL SØLU
15 Café-borð biliga til sølu.
Tlf. 313430

HYGG HER!
70 ára gamalt hondgjørt seymiborð til solu, við stóli. Gev eitt boð.
Tlf. 504213 eftir kl. 16

TIL SØLU VEGNA FLYTING
3 mðr. gamlar 3+2 sofur til sølu fyri 3.500 kr. Nýprísur 4.500 kr.
Tlf. 310826/256345

REOL TIL SØLU
Ein Matterhorn reol við tveimum glashurðum og trimum træ, 4 skuffur og gott pláss til annað. Til sølu fyri 1.000,-
Tlf. 509756

TIL SØLU
Ein ljós nistrut brúnlig hornasofa úr stoffi til sølu fyri 800 kr. Ring
Tlf. 314473 ella 229101

TIL SØLU
Barnasong við trappu, skrivararborði og madrassu, stødd 190x70, í góðum standi fyri 400 kr.
Tlf. 448166

TIL SØLU
Borð og 4 stólar úr træ biliga til sølu.
Tlf. 447160

TIL SØLU
Leðursofar 3-2 pers. nýprísur 11.000,- fáast fyri bert 5.500,- vegna flyting (svartar – um nýggjar).
Tlf. 583388

TIL SØLU
Sofaborð 150 kr. Træ køksborð 400 kr. Trædiskur 500 kr. Stovuborð 12 pers. 700 kr.
Tlf. 583388

SOFA
2 mans sofa 71 x 123 ikki leður, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 271723

Leikur

LEIKUR TIL SØLU
Posar v/ ymiskum leikum til sølu fyri bert 10,- og 20,- kr. vegna flyting.
Tlf. 583388

LEIKUR YNSKJAST
s. s. skutari, skreiðibani, bilar, gravimaskinur, chau chau dukkur, babyborn dukkur og dukkustólar.
Tlf. 457144

Lutaseðlar

LUTASEÐLAR
Í samband við tiltakið fyri gøtuborn í Kiev, sum var í Kvívík 6. nov. eru hesir vinningar ikki avheintaðir: Cloé stick nr. 10548 appelsingulur, Shell 200 kr. 26958 hvítur, Havnarsøgur 182 nr. 28073 hvítur, Gávukort Salong Gudny nr. 28129 hvítur,
Dr. Magic stólurin nr. 10746 appelsingulur,
Idé húsið nr. 28106 hvítur.
Vinningarnir fáast við at ringja til Elsi, tlf. 421610. Inn komu 24.105 kr. og tað takka vit hjartalga fyri.
Sunnudagsskúlin í Kvívík

LUTASEÐILIN
Sum skuldi dragast 11. nov. er útsettur at vera 18. nov. 2004. Basarurin verður eisini 18. nov.
KFUK, Varðagøta 9

FRÁ FS-VÁGUM
Vinnarin av tarvamykjukappingini var nr. 387. Tarvurin fæst við at venda sær til.
Tlf. 333410

Matur

KROV
Enn eru nøkur lambs-/heystlombskrov eftir. Senda um alt landið.
tlf. 370060/507902

VEÐRAKROV
Nøkur veðrakrov til sølu.
Tlf. 371243/261864

GAMAL HAVHESTUR
kann billeggjast royttur og sviðin. Verður koyrt til hurðina, 35 kr. pr. stk.
Tlf. 225781/507313

Pløgg

TIL SØLU
Graviditetsbuksur (nýggjar/cowboy) til sølu, kr 350
Tlf. 522120

BRÚÐARKJÓLI
av merkinum Lilly, std. 36, og skjúrta til brúðgommin, std. 40, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 315769/225558

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
(langur og flottur) og tilhoyrandi jakki til sølu. Str. 36. Brúkt einaferð. Keypt á vári 2004 frá Lilly. Nýprísur uml. 1600 kr. Selist samlað fyri 900 kr.
Tlf. 311430

EITT »PAU«SETT TIL SØLU
Hvitt »Slá om« troyggja og brúnur niðurdeilur. Bert 550 kr. Nýprísur var 1.300 kr. Ring
Tlf. 310734 eftir kl. 17.00

TIL SØLU
Ein sera vakur brúðarkjóli til sølu. Stødd 38-40, brúktur 1 ferð, keyptur í Spanien.
Tlf. 447160

Samband

TÚ KVINNA
sum eg møtti í Reyðakross bókahandli 18. sept. Tú vart áhugað í søguligum skaldsøgum. Tú keypti bókina sum Vigdis Hjort skrivaði. Eg eri tann maðurin, sum fann tvær bøkur til tín, men tú hevði lisið tær. Set teg í samband við meg. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1953

Sjavs

SJAVSKAPPING
Verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45
LÍF

SJAVSKAPPING
Verður í húsum felagsins í Torvgøtu 10. nov. kl. 18.45.
Eldrafelagið Nón

Súkklur

TIL SØLU
Minearelli krumptappur 1600 umdr. til Yamaha Jog ella Aprilia Sonic. Til sølu fyri 16.000,- vegna feilkeyp.
Tlf. 509756

APRILIA RX50
við alufelgum í finasta standi. Koyrt 4700 km. Nýggj Juni 2003. 25000 kr. Nú: 17.900 kr.
Tlf. 220380 421326

SKUTARI TIL SØLU
2 ára gamal bláur Yamaha Aerox skutari til sølu. Skutarin er sera væl viðfarin. Ring og spyr eftir
Angelicu, tlf. 251025

APRILIA RX 50
Til solu vegna bilkeyp. Bert koyrt 3.000 km. Prísin tosa vit um. Ring
Tlf. 256878 Tummas

SKUTARI TIL SØLU
Gott 2 ára gamal Hussar skutari til solu fyri 6.000 kr. Ringi
Tlf. 214955

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Yamaha RS 125 í hampuligum standi. Árg. '86. Nýsýnað, men skal skifta forskerm. Nýggj dekk og nýtt seturbetrekk. Ymiskir eykalutir fylgja við. Prísuppskot 9.500,- kr.
Tlf. 319618

TIL SØLU
Aprilia RS50 '99 hevur koyrt 5100 km. Manglar útstoyt og innsúgving. Boð undir 10000 kr. ongan áhuga.
Tlf. 255178

DREINGJASÚKKLA TIL SØLU
Næstan óbrúkt dreingjasúkkla til 5-7 ár til solu fyri 600 kr.
Tlf. 256495

Teldur

FARTELDA TIL SØLU
2.8 Ghz ATI Mobility radeon 9000, 1024 MB RAM, tráðleyst net, 60 GB harddisk DVD-drev og CD-brennara í einum, Infrared Win XP pro
Tlf. 266172

GÓÐ TELDA TIL SØLU
Dell Pentium 4, 3 GHZ, 1 GH Ram, 17" flatskerm, 1/2 ára gomul, til sølu um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 283568

DVD-R FLØGUR TIL SØLU!
Spindel við 25 dvd-r flogum til solu fyri 200 kr. Til solu vegna feilkeyp.
Tlf. 214789

TELDA BÍLIGA TIL SØLU
AMD Athlon 1600+ 768 MB RAM. Tveir 40 GB harðdiskar, DVD drev og flogu brennari. Geforce 2 Pro Skermkort 5. Surround ljóðkort. Netkort, tastatur og mús. 19" Skermur. Windows XP. Epson C20 printari.
Tlf. 310011/504011 eftir kl 18

PLAYSTATION 2
v/ 1 stk joystick og memory kort. 10 spøl m.a. Half life, resident evil, outbreak. Logitech hátalarasett. Til sølu fyri 1.800,-
Tlf. 254405

LG DVD-SPÆLARI
kodufríur, silvurlittur, hevur DTS, Dolby digital, 3D surround, kann avlesa CD og MP3. Til solu fyri 2.000,- Nýprísur 3.200,-
Ring 254405

PC-SPØL
Dune 2000 40 kr. Battle Realms 40 kr. Iron Storm 100 kr. Hitman Contracts 2004 200 kr. Anno 1503 (The now world) 100 kr.
Tlf. 264955

FARTELDA
Ein Vega+ 2.0 MHz, 512MB DDR RAM 30GB HDD, Combo DVD/CD-RW. windows xp. sera góð til skúlabrúk til solu fyri bert 7.000
Ring 583636 (Klax)

FARTELDA
Dell Inspiron 8600 15,4" widescreen (1680x1050) 1,7 GHZ centrino, 512 ram, Geforce 128 mb ram grafikkort, 60 GB hardisk, LAN, WLAN, 56k modem, DVD-brennari, firewire, USB 2.0, windows xp pro + onnur forrit. 9 mðr gomul sera vælhildin. 10.000,-
Tlf. 223573

HEY
Er tað nakar, ið vil keypa eitt Playstation 1 við uml. 24 spølum, memorykorti og 2 joystikk fyri minst 2.000 kr.
Tlf. 503001

EIN PS2 TIL SØLU
2 joystikk, 1 memorykort og 6 spøl: Wild wild racing, WRC II Eztreme, The Getaway, NES underground, GTA Vice city og Hitman contracts. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 264534

GÓÐ TELDA TIL SØLU
AMD 2400+, 1GB DDR Ram, 73GB, GeForce FX5600 256MB Ram, Netkort, CD og DVD rom, 17" skermur, hátalarar, tastatur og mús. Windows XP og Microsoft Office er á telduni. Nýprísur 13.249 kr. Til solu fyri 6000 kr.
Tlf 252745, helst aftaná kl. 16

##